


### Grønlands-Jóhan:

# Kolonistjóri í Umanak



**ÓLI JACOBSEN**
*olij@sosialurin.fo*

**Tað er heilt fitt av føroyingum, sum longu í 19. øld virkaðu í Grønland. Ein tann mest kendi var Grønlands-Johan**

Grønlands-Jóhan var sonur Niclas Joensen úr Bø og Súsannu Joensen úr Tórshavn.

Jóhan var føddur í 1857 í Tórshavn, har pápin var krambakallur í kongiliga handlinum. Tá hesin helt uppat í 1856, fluttu foreldrini stutt aftaná vestur til Miðvágs at búgva. Í 1870 fór Jóhan til Vestmanna at vera hjá Hans Wilhelm Reinert og konu hansara Jóhannu, sum var abbasystir hansara.

Hans Wilhelm hevði eisini arbeitt við kongiliga handilin í Havn og tók í 1858 við úthandlinum í Vestmanna, sum týski handilsmaðurin C.F. Siemens hevði keypt.

17 ára gamal fór Jóhan til Havnar og bleiv handilslærlingur í krambúðini hjá Siemens.

Í 1880 fór Jóhan til Danmarkar og kom aftur til Føroyar í 1884, tá ið hann arbeiddi á fútaskrivstovuni í Havn.

Vit vita ikki so nógv um tíðina, meðan han var í Danmark. Men roknað er við, at hann í hesum tíðarskeiðinum yrkti móðurmálssangin, har fyrsta ørindi ljóðar soleiðis:

*Várt móðurmál tað hevur*
*so ringa lagnu havt,*
*men einki annað eigur sum*
*tað so stóra kraft,*
*til føroyingar at samla og*
*halda saman fast,*
*so leingi hjartatónin í*
*teimum ikki brast.*

## Til Grønlands

Jóhan fann saman við Amaliu, dóttir kenda sýslumannin Hans Christoffer Müller og Maren Christine f. Olsen.

Amalie var í 1887 ein av teimum fyrstu kvinnum, sum tók læraraprógv í Føroyum.

Í 1890 fóru tey til Danmarkar, har tey 1. maj 1890 giftust í Skæve kirkju í Dronninglund provsti. Amalie hevði eina systur, sum æt Sigrid, gift Folting. Maðurin var skógriddari.

Nú gekk leiðin beinleiðis til Grønlands, har tey vóru í 12 ár. Tey fyrstu árini í Grønlandi búðu tey í Godthaab, síðan í Egedesminde.

Seinastu árini í Grønlandi búði familian í Umanak, har Jóhan var kolonistjóri.

Jóhan og Amalie fingu fýra synir, sum eru føddir í Grønlandi og eina dóttir, sum er fødd í Havn.

Elstur var Hans Christian Wilhelm Reinert, føddur 1891 í Godthaab.

Næstur var Christian Niclas Ulrik, vanliga nevndur Kiss. Hann var tvey ár seinni føddur í Egedesminde eins og teir yngru beiggjarnir.

Síðan komu Guttorm Hans Egede, føddur í 1895 og Olaf Petræus, føddur í 1897.

Systurin Ebba Susanna, gift Schrøter, var fødd í Havn í 1904.

Á sumri 1902 vendi familian aftur til Føroyar við skipinum ”Godthaab”.

Tá var sjónin hjá Jóhan farin at bila, og hann var næstan blindur. Hetta var óivað orsøkin til, at tey longu tá fluttu heim aftur.

Í Havn búsettust Jóhan og Amalia í húsunum í Rættará, sum vóru nevnd Christinesminde. Bróður Amaliu, Poul Müller, átti húsini. Johan doyði í 1907 bert 50 ára gamal.

Frá september 1908 til 1934 helt Amalia privatskúla fyri smábørn í heimi sínum. Hon doyði í 1944.

## Væl umtóktur millum granskarar

Í tíðini í Grønlandi var Jóhan sera væl umtóktur millum granskarar, sum ferðaðust í Grønlandi um hetta mundi.

Millum annað kan nevnast, at hann var sera hjálpasamur, tá ið Robert E. Peary ætlaði at finna Norðurpólin. Tað eyðnaðist tó ikki fyrr enn í 1909.

Fyri hjálpsemið fekk Jóhan eina riflu, sum hann hevði við sær aftur til Føroyar í 1902. Jóhan hevði mangar lutir við sær aftur til Føroyar. Millum hesar eru tey hvalakjálkabein, sum enn standa og gleiva tvørtur um vegin frá portrinum og niðan til húsini í Rættará.

Í tíðini 1898 til 1902 ferðaðist skiparin Otto Sværdrup við skipinum ”Fram” við Ellesmere oynna. Hann skrivar í dagbók síni:

Efter fire år i isen kom vi frem til Umanak, hvor vi for første gang i fire år traf civiliserede mennesker. Det var kolonibestyrerens frue ”fru Joensen” og præsten der på stedet. Vi traf ikke kolonibestyreren, han var på inspektionsrejse i distriktet.

Vi holdt en lille fest ombord på ”Fram”, og i denne anledning forærede vi fru Joensen en saks, som stod på Frams inventarliste og var stemplet med nr. 36.

Hesin saksurin varð í 1994 handaður Framsavninum av Solveig Niclasen, abbadóttir Jóhan. Hann liggur nú í skiparakamarinum á ”Fram”.

Det danske Filmmuseem skrivar á heimasíðu síni, at tann fyrsti filmurin við livandi myndum, gjørdur í Danmark, vísir Jóhan koyra viðgrønlendskumsleduhundum í Fælledparkini í København í 1897. Filmurin kann síggjast á internetinum.

## Villi

Sonurin Villi hevði eina serliga søgu. Hann er farin ungur úr Føroyum, umleið 1910. Hann var við einum skipi, sum kallaðist "Viking". Ættin heima hevur frætt frá honum at byrja við. M.a. vistu hon, at hann kom til Vladivostok eystast í Ruslandi. Men brævaskiftið tykist at vera steðgað nokk so skjótt. Longu í 1911 skrivar mamman, at hon vónaði, at tað var leti og ikki sjúka, sum var orsøkin til, at hon einki frætti frá honum.

Hann sigldi undir fyrra heimsbardaga í Amerika sum kaptainur. Hann ætlaði sær at koma heim eftir tann heimsbardagan, men hann misti alt, sum hann átti. So mátti hann halda fram at sigla og var skipari umborð á ferðamannaskipi.

Vilhelm kom undir krígnum við einum herskipi at vitja mammuna, sum nú var gomul. Hann var heima ein mánaða. Tá er hann farin til Íslands, har hann var ovasti fyri amerikanska flotan har. Meðan hann var í Íslandi, hevði hann heitið admiralur.

Hann var við í innrásini í Frankaríki D-dagin, 4. juni 1944, har hann stjórnaði øllum sleipibátunum á innrásarstrondini.



KOLONIBESTYRER I GRØNLAND
JOHAN CARL JOENSEN
F. I THORSHAVN 25-9 1857 D. 2-10-1907

AMALIE JOENSEN F. MÜLLER I THORSHAVN
F. 2-7 1866 D. 2-5 1944.

Eftir kríggið fór hann aftur til Amerika. Vilhelm fekk tá heiðursbræv frá sjálvum Truman forseta.

Vilhelm var ógiftur. Hann doyði í 1949.

***Keldur***:
Ingvard Niclassen
FF-blaðið



*Johan og Amalia*



*Synirnir, fv. Vilhelm, Christian, Guttorm og Olaf*



*Villi sum admiralur*

**Rætting**
Í seinasta parti varð sagt, at Sofie Helene Restorff nýtti sín uppsparda pening, sum var ætlaður til enn eina ferð til Keypmannahavn, at bjarga handlinum hjá soninum Poul undan húsagangi. Hetta seinasta er skeivt. Peningurin var ikki nýttur til hendan handil, men onkran annan, sum var í hesi støðu.

**Komandi partur:**
Í komandi viku fara vit at greiða frá bøkjaranum Jacob Jacobsen